FISKIMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Fisheries and Maritime Affairs



# Snild sild ella fiksur fiskur

## Deildarleiðari til løgdeildina í Fiskimálaráðnum

Starvið sum deildarleiðari á løgdeildini í Fiskimálaráðnum verður við hesum lýst leyst at seta skjótast gjørligt.

Umsøkjarin skal hava lokið prógv sum løgfrøðingur (cand. jur.), duga væl at samstarva og at arbeiða sjálvstøðugt.

***Høvuðsuppgávurnar í starvinum eru***

- at veita løgfrøðiliga ráðgeving innan fiskivinnumál, sjóvinnumál og tilbúgving,
- at hava løgfrøðiligu ábyrgdina í sambandi við arbeiðið at tilevna uppskot til lógir, kunngerðir o.a. innan fiskivinnuøkið, tilbúgving og aðra lóggávu á sjóvinnuøkinum,
- at veita løgfrøðiliga ráðgeving í sambandi við sakarmál, ið antin er lagt ímóti ella av Fiskimálaráðnum, um eitt mál eigur at kærast e.a.,
- at umsita onnur mál hjá Fiskimálaráðnum, har mett verður neyðugt við løgfrøðiligari viðgerð, antin við sjálvstøðugari málsviðgerð ella saman við øðrum løgfrøðingum uttan fyri ráðið,
- at vera skipaskrásetari,
- at mynda leiðsluna í Fiskimálaráðnum í breiðari høpi.

***Setanarviðurskifti***
Starvið verður lønt sum ***deildarleiðari II*** eftir sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelag Føroya. Starvsøkið fatar um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini stjórnarráðini. Tænastustaðurin er í løtuni Fiskimálaráðið.

Tann, ið fær starvið, má kunna tola broytingar í virkisøkinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

***Umsóknir***
við avritum av prógvum, lívsgongdarlýsing og øðrum skulu sendast til:
Fiskimálaráðið
Postboks 347
110 Tórshavn
ella til fisk@fisk.fo
***innan 21. januar 2008.***

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Rógva Reinert, aðalstjóra, ella Hera Joensen, deildarleiðara, á telefon 353030.

Fleiri upplýsingar um Fiskimálaráðið eru á heimasíðuni **www.fisk.fo**

*Fiskimálaráðið er eitt av sjey stjórnarráðum í miðfyrisitingini, sum veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika. Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum umsitur málsøkini fiskivinna, sjóvinna og tilbúgving. Fiskimálaráðið vegleiðir landsstýrismannin, soleiðis at avgerðirnar eru rættar og haldgóðar. Ráðið fyrireikar lógir, kunngerðir og reglugerðir, og hevur eisini eftirlit við, at ásettar reglur verða fylgdar. Somuleiðis røkir ráðið samskipandi uppgávur innan málsøkið hjá landsstýrismanninum, og tekur lut í millumlanda samráðingum, altjóða fiskiveiði- og sjóvinnufelagsskapum umframt norðurlendskum samstarvi.*

*Vit draga eina línu*
*Vit seta skynsemi í hásæti*
*Vit vilja vita*
*Vit bróta slóð*

SENDISTOVAN



# Halt kós !

Fólkaflokkurin fer í komandi samgongu at:

- Skunda undir vøksturin í búskapinum
- Gera búskapin meira sjálvberandi
- Halda fram at einskilja
- Yvirtaka málsøki miðvíst og stigvíst
- Linka skattatrýsti á arbeiðsinntøku
- Hækka pensjónirnar
- Bøta útbúgvingarstøðið á øllum lærustigum
- Fjøltátta húsamarknaðin við fíggingar- og ognarformum
- Gera inntøku av útleigan skattafría og á tann hátt økja útboð og hækka góðskustøði á leiguíbúðum
- Linka skattin á lønum hjá pensjónistum
- Lyfta fólkaskúlan úr 4. upp í 1. deild í PISA
- Skapa karmar fyri nýggjum vinnum
- Leingja barsilsfarloyvi upp í 12 mánaðir

**Men so tørvar okkum tín kross fyri A**

ÓLI BRECKMANN